– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Góð hús við frálíkum útsýni

**Panoramaútsýnið inn yvir Havnina og út yvir Nólsoyarfjørð er heilt einastandandi, og tú kennir teg avgjørt sita í fremstu røð.**






## Umhvørvið

Tú koyrir eftir høvuðsgøtuni út á Argir og niðan eftir blinda vegnum – niðan í friðarliga og barnavinaliga sethúsaumhvørvi, har tú finnur hesa frálíku ogn, har tú kanst búgva, liva og breiða teg út. Grundøkið er 541 fermetrar, og garður er runt húsini, so har er nóg mikið av plássi. Omanfyri er urtagarður við fleiri ymiskum blómum og trøðum. Stutt er til oman frálíku bátahavnina eins og til skúla, barnagarð og til bussamband, men húsini standa veruliga ikki longur burtur enn, at tú kanst ganga til miðbýin í Havn.

## Húsini

Húsini eru eini væl bygd Fjarðahús frá 1986, men húsini eru dagførd og viðlíkahildin, so tey eru í góðum standi. Klædningur og vindeygu eru úr træ, og takið er úr aluminium við tøttum tróðri undir. Ymiskat ábøtur eru gjørdar so við og við. Í fjør var grundin bjálvað og klødd, og hitapumpa er sett upp, so húsini eru hampiliga bílig at halda og reka. Niðasta hædd var innrættað í síðst í 90'unum, og væl ber til at gera eina sjálvstøðuga íbúð.

## Innrætting

Í ovaru hædd er hjallur, inngongd, durur, trappurúm, gongd, baðirúm, 3 kømur, køkur, stova við útgongd til altan. Í niðaru hædd er inngongd, durur, gongd / trappugongd, 2 goymslurúm, stova, 2 kømur, baðirúm og fýrrúm.

## Fakta

**Adressa** ...........Heiðagøta 13, Argir
**Byggiár:** ...........1986
**Hæddir:**............2
**Gólvvídd:**..........224 m²
**Grundøki:**.........541 m²
**Hjallur:** .............Ja
**Prísuppskot:** ...kr. 1.950.000






PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**